## 27 hava longu biðið um pláss í Vági

Tað er stórur áhugi hjá teimum eldru í Suðuroy at sleppa inn á nýggja ellis- og røktarheimið, sum nú stendur í gerð í Vági og sum verður tikið í nýtslu næsta ár.

Kirstin Strøm Bech, sum er forkvinna í stýrinum fyri ellis og røktarheimið, sigur, at longu nú hava 27 fólk søkt um at fáa pláss á heiminum.

Umsóknarbløðini til tey vórðu send í farnu viku.

Borgarstjórin í Vági sigur, at talan er um eldri fólk í Sumba, Vági, Porkeri og í Hovi og tey flestu av teimum eru farin um tey 80 ár.

Á nýggja heiminum í Vági er pláss fyri 24 búfólkum, so líkt er til, at tað verður yvirteknað beinanvegin.

Hon tekur hetta sum tekin um, at sera stórur tørvur er fyri at sleppa inn á heimið, tí allar hesar umsóknirnar eru komnar inn, longu áðrenn tey hava lýst við, at tað er klárt at søkja um pláss.

– Hetta eru helst fólk, sum vilja vera í góðari tíð fyri at tryggja sær pláss á heimum, sigur Kirstin Strøm Bech.

Annars hevur stórur ivi verðið sáddur um, hvussu stórur tørvurin á ellis- og røktarheimsplássum er í Suðuroy yvirhøvur.

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna, hevur meiri enn einaferð upplýst fyri Løgtinginum, at í Suðuroy er bráðneyðugur tørvur á sjey ellis- og røktarheimsplássum.

Men hesum vísti Anna Djurhuus, leiðari á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi aftur.




*Støðan hjá Eik stendur við og versnar og nú verður hann eisini meldaður fyri at hava svikað fyri eina milliónaupphædd*

# EIK MELDAÐ TIL LØG-REGLUNA

**MELD** Eik Banki verður nú meldaður til Løgregluna fyri at hava fuskað við skjølum og samstundis verður krav sett fram um stórt endurgjald

Áki Bertholdsen

Trupulleikarnir hjá Eik vilja ongan enda taka og nú verður bankin oman á alt, eisini meldaður til løgregluna.

Tað er greitt, nú samstundis sum Jørn Astrup Hansen situr í bankanum og roynir at greiða teir fløktu træðrirnar fyri Fíggjarligt Støðufesti, sum yvirtók hann, eftir at hann hevði rent seg í fíggjarligt óføri.

Málið er at selja Eik fyri jól, men nú fær bankin so umfatandi sakarmál afturat at dragast við.

Tað er Smápartafelagið Sjey, sum nú fer at melda Eik og fráboðanin verður latin løgreguni um einar tvær vikur.

Stjórin, Jan Joensen, hevur ongar viðmerkingar til málið í løtuni.

Men vælvitandi keldur staðfesta fyri Sosialinum, at Sjey fer at melda Eik fyri at hava fuskað við skjølum, sum tikið verður til.

Talan er um eina milliónaupphædd, sum Eik verður meldað fyri at hava fuskað við og í øllum førum er upphæddin so mikið stór, at hetta var beinleiðis orsøkin til, at Smápartafelagið Sjey fór í sjálvbodna likvidatión fyri eini góðari viku síðani.

Keldur okkara siga, at Sjey eru ikki tey einastu, ið fara at melda Eik, men at eisini aðrar fyritøkur føla seg so illa handfarnar av Eik, at tær somuleiðis fara at melda bankan.

Talan er um so ógvusligt óreglusemi, at fyritøkurnar halda, at tað er rættast at melda.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Jørn Astrup Hansen áðrenn blaðið fór til prentingar.

aki@sosialurin.fo